# Átta posthús í Føroyum hundrað ár

**Týsdagin 1. juli 2003 varð veitsludámur á átta ymiskum posthúsum í Føroyum, í sambandi við at 100 ár vóru liðin, síðan tey lótu upp sum brævstøðir. Í hesum sambandi var møguligt hjá fólki at keypa postkort við frímerkjum og serstempli, ið eru framleidd til hetta serstaka høvið**



*Soleiðis var postflutningurin í Føroyum fyri 100 árum síðan. Her verða ferðafólk og postur førd í land í Vági*

POSTSØGA

*Kelda: Postur í Føroyum v. Vilhelm Johannesen*
*Lagt til rættis: Magnus Gunnarsson*

Tann 1. juli 1903 varð ein verulig nýskipan sett í verk viðvíkjandi postverkinum í Føroyum. Tá vórðu átta brævstøðir latnar upp. Fimm av hesum komu at hoyra undir postavgreiðsluna í Tórshavn. Hesar vóru: Sandur, Miðvágur, Vestmanna, Eiði og Strendur. Fuglafjørður kom at hoyra undir postavgreiðsluna í Klaksvík, og Vágur og Hvalba komu at hoyra undir postavgreiðsluna í Trongisvági. Í skrivi frá aðalstýrinum í Keypmannahavn til postavgreiðslurnar í Tórshavn, Klaksvík og Trongisvági varð sagt frá hvussu nýggju brævstøðirnar og postútberingin skuldu skipast. Eisini varð staðfest at nýskipanin skuldi metast sum ein royndarskipan. Eftir hetta lótu fleiri og fleiri brævstøðir upp, og er talið í dag komi upp á 41 brævstøðir kring oyggjarnar.

## Fuglafjørður

Posthúsið í Fuglafirði læt upp 1. juli 1903. Fyrsti postvgreiðslumaðurin var Tummas Juul Petersen, sýslumaður í Eysturoy. Tá hesin flutti til Klaksvíkar í 1910, tók bróðir hansara, Hans Jacob Petersen, við sum postavgreiðslumaður. Í 1926 tók dóttir Hans Jacob, Alma Rustin, ábyrgdina av postviðurskiftunum í bygdini. Meginpartin av tíðarskeiðnum fram til 1975, tá Alma fór frá, var posthúsið í hølum í heimi hennara. Alma valdi at fara frá í sambandi við, at posthúsið flutti í nýggj høli. Dóttir hennara, Margretha Rustin Johannesen, tók síðan við sum posthúsleiðari og sat í starvinum til 1994, tá núverandi posthúsleiðarin, Sigrun Jacobsen tók við. Á posthúsinum starvast fýra fólk.

## Strendur

Brævstøðin á Strondum lat eisini upp 1. juli 1903, men varð niðurløgd aftur í 1908. Í tíðarskeiðnum 1908 - 1918 var ein postskiftisstøð á Strondum í krambúðini hjá Hans Jacobi Poulsen niðri í Heygsstøð. Brævstøðin varð síðan latin uppaftur í 1918 í krambúðini hjá Hans Jacob Johansen, sum tá gjørdist brævsavnari. Eftir ein eldsbruna í 1932, har allur posturin brendi, flutti brævstøðin inn í eitt annað hús hjá Hans Jacobi har posthúsið húsaðist til 1967, tá Martin Johansen tók við sum brævsavnari. Síðan flutti posthúsið inn aftur í tann upprunaliga bygningin, sum var karmur um brævstøðina frá 1918, og í 1981 lat posthúsið upp í bygningunum hjá Føroya Banka. Martin Johansen fór frá vegna aldur í 1997, og hevur Joan Sandursdóttir síðan verið posthúsleiðari á Strondum.

## Sandur

Fyrsta brævstøðin í oynni lat upp heima á Sandi 1. juli 1903 í krambúðini hjá Rasmus Petersen. Hesin hevði ábyrgdina av postinum til 1925, tá Edward Hjalt, timbursmiður, gjørdist brævstøðarmaður og posturin varð fluttur í heim hansara. Dóttir Edward, Marianna Hjalt tók síðan við postinum í 1949 og hevði hann um hendi heilt fram til 1994. Í dag er Sólbjørg Skoubo posthúsleiðari á Sandi. Trý fólk arbeiða á posthúsinum.

## Eiði

1. juli 1903 varð brævstøð latin upp á Eiði. Men helst hevur Eiði verið postumbýtisstað áðrenn hetta. Fyrsti postmaðurin var Niels Kruse, keypmaður, sum sat við postinum frá 1903 til 1926. Helst hevur krambúðin hjá honum verið postumbýtisstað áðrenn bygdin fekk brævstøð.

Í 1926 fekk Anthon Martin Ellingsgaard ábyrgdina av postinum. Hann sat við postinum til hann doyði í 1957. Síðani hava ættarfólk hansara umsitið postviðurskiftini á Eiði. Núverandi posthúsleiðarin, Elinborg Reinert, tók ábyrgdina av postinum frá í 1995. Í januar 1998 flutti posthúsið á Eiði fyri fyrstu ferð inn í egin høli, sum postverkið hevur keypt og umbygt.




*Í sambandi við 100 ára dagin bleiv eitt stempul gjørt til hvørja av bygdunum. Stemplini líkjast teimum gomlu, ið vórðu brúkt fyri 100 árum síðan. Tey ið ynskja sær øll 8 stemplini kunnu venda sær til Frímerkjadeildina á Argjum tel. 346200.*

## Vestmanna

Brævstøðin í Vestmanna lat upp 1. juli 1903. Fyrsti brævstøðarmaðurin var Jógvan Winther, sum keypti gomlu sýslumanshúsini og hevði postin har. Tá Jógvan Winther flutti úr Vestmanna í 1923, gjørdist Niels Kristoffer Poulsen nýggjur brævsavnari í bygdini, og varð posturin sostatt fluttur til heim hansara. Hann var stýrimaður og sigldi nógv sum flaggskipari við norskum hvalabátum, og tí var tað í stóran mun konan, sum tók sær av postinum. Niels Kristoffer Poulsen gekk burtur í 1932, og tók kona hansara, Kristianna Poulsen, tá ábyrgdina av postinum. Í februar 1955 gjørdist postavgreiðslan í Vestmanna veruleiki. Sama ár segði Kristianna Poulsen seg úr starvi, og varð dóttir hennara, Anna S. Durhuus tá sett í starv sum postavgreiðsluleiðari. Anna sat í starvinum til 1960, tá núverandi postavgreiðsluleiðarin, Jógvan Durhuus, tók við ábyrgdini av posthúsinum. Á posthúsinum í Vestmanna starvast fimm fólk.

## Vágur

Brævstøðin í Vági lat upp tann 1. juli 1903, og longu í august 1904 varð brævstøðin umskipað til postavgreiðslu. Danin, Anders Olsen var tann fyrsti brævsavnarin og fyrsti postavgreiðslumaðurin í bygdini, og hevði hann postin heima hjá sær í Toftum. Anders Olsen sat við postinum fram til 1933, tá Andreas Djurhuus tók yvir og samstundis flutti postin úr Toftum í heim hansara í Tippunum.

Í 1980 fór Andreas Djurhuus úr starvinum sum postavgreiðslumaður, og Petur Vilhelm varð settur í starvið. Tá hann fór frá vegna aldur í 1990, tók núverandi posthúsleiðarin, Marianna Eystberg við sum leiðari á posthúsinum, sum síðan 1983 hevur hildið til í egnum hølum á Fløðulið.

## Miðvágur

Posthúsið í Miðvági lat upp tann 1. juli 1903, sum tað fyrsta posthúsið í oynni. Dánial Pauli í Beitinum hevði ábyrgdina av postinum tey fyrstu nógvu árini. Hann sat við postinum til hann andaðist í 1934. Beitishúsið var fyrsti karmurin um postviðurskiftini í Miðvági. Eftir Dánial Paula tók sonur hansara, Sørin Danielsen við starvinum, og varð posturin tá fluttur heim til Sørin. Posthúsið var har í húsunum í 36 ár fram til 1970. Eftir at Sørin í Beitinum legði frá sær í 1964, tók Bodil Ellefsen við sum posthúsleiðari. Í 1969 keypti hon eini hús í bygdini og flutti hagar við postinum. Í 1983 keypti hon gomlu kommunulæknahúsini til sethús og posthús, og vóru hesi húsini karmur um postviðurskiftini til 1996, tá posthúsið flutti í leigaði høli hjá Føroya Banka. Á posthúsinum í Miðvági starvast tvey fólk, umframt núverandi posthúsleiðaran, Jóhannes Ellefsen.

## Hvalba

Brævstøðin í Hvalba varð skipað 1. juli 1903 í miðhæddini í Stórstovu, sum var heimi hjá fyrsta brævstøðarmanninum, Jógvani Nattestad. Í 1916 verður sonur Jógvan, Niels Jacob Joensen Nattestad settur sum brævstøðarmaður. Hann er í hesum starvi til 1950, tá sonur hansara, Óli Nattestad varð settur í starv sum brævstøðarmaður í bygdini. Frá 1956 fekk Esther Johanna Nattestad ábyrgdina av brævstøðini í bygdini. Maður hennara keypti ein bygning, sum varð nýttur til posthús. Í 1992 tók núverandi posthúsleiðarin í Hvalba, Astrid Nattestad við sum leiðari á posthúsinum, sum síðan 1996 hevur hildið til í leigaðum hølum.



*Nógv fólk vitjaði inn á Posthúsini í gjár. Her eru vit á posthúsinum í Vági, har Marita á Løgmansbø fær eitt postkort við stempli á frá Joan Poulsen postavgreiðslukvinnu*

*mynd: Dagfinn Olsen*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kál Kyrjarheyg 80 ár

Í dag, mikudagin 2. juli, verður Jacob Mikal Kyrjarheyg í Klaksvík, vanliga nevndur Kál, 80 ár. Sum flestu í hansara ættarliði, so sigldi hann ein stóran part av sínum arbeiðsárum, men síðani hann legðist upp fyri einari fjórðings øld síðani, hevur hann verið við til at seta dám á Klaksvíkina á tann hátt, at hann saman við øðrum hevur verið við til at gjørt nógvar grótlagingar.

Kál er ættaður av Viðareiði. Foreldrini vóru Súsanna Margretha, dóttir Jógvan í Eiðsvík, og Julius Jacobsen. Húsini hjá teimum stóðu á trønni, sum tey høvdu eysturi á Kyrjarheyggi. Kál fekk sær í 1958 Kyrjarheygg til eftirnavn.

Julius og konan búðu nógvu tey síðstu árini í Klaksvík, og hann gekk ikki undir øðrum navni enn Julius á Viðareiði. Súsanna Margretha og Julius áttu seks børn: Erikka, Jógvan (doyði sum smádrongur), Hanna, Jógvan, Kál og Sigurd. Jógvan og Sigurd búsettust á Viðareiði og hini í Klaksvík. Tey eru øll á lívi uttan Sigurd, sum doyði fyri tólv árum síðani.



*80 ára føðingardagsbarnið saman við abbasoninum og navnanum frammanfyri Drangin norður úr Viðoynni*

Kál giftist við Odnu Joensen úr Vági í Klaksvík. Foreldrini hjá henni vóru Julia og Christoffur Joensen. Julia doyði í 1929, og Christoffur sat eftir við átta børnum. Odna, sum tá var tvey ára gomul, vaks upp í Krotugrøvini hjá Jacobinu og Joen Jacob Ziska Vitalis, sum var betri kendur undir navninum Jakku–Post.

Eftir at Odna og Kál vórðu gift í 1953, bygdu tey sær hús í Krotugrøvini í trønni hjá Jakku–Post, og har hava tey búð síðani. Nú er Odna á Røktarheiminum, og Kál, sum framvegis er væl fyri, er um hana hvønn einasta dag.

Børnini hjá Odnu og Kál eru Heðin, sum er føddur í 1954, og Súsanna, sum er fødd í 1964. Heðin býr í Klaksvík og Súsanna í Norðdepli, har hon er gift við Jens Christiansen. Børnini hjá teimum eru tólv ára gamla Oddbjørg og átta ára gamli Jákup Mikal, sum eitur eftir abbanum.

Í 1938 fór Kál fyrstu ferð til skips. Tað var við skonnartini Stellu Mariu. Undir krígnum var hann heimamaður. Hann arbeiddi hjá Kjølbro, har hann eisini koyrdi lastbil. Eftir kríggið fór hann aftur til skips, og tá sigldi hann fyri tað mesta við skipunum hjá Jóan Jakku á Viðareiði. Synirnir hjá Jóan Jakku og Kál vóru systkinabørn. Jóan Jakku og Julius vóru hálvbrøður. Teir vóru úr hvør sínari giftu hjá Jacob Michael, abbanum, sum Kál eitur eftir. Jóan Jakku var yngst av fýra børnum í fyrru giftu, og Julius var tann yngri av tveimum børnum í seinnu giftu.

Kál sigldi eftir kríggið við eitt nú Coronet, Viðoy og Fugloy. Í 1949 var hann við kvívíkstrolaranum Egili, og hann var við, tá ið Egil sakk í Barentshavinum 24. oktober 1949. Mansskapið taldi 22, og teir vóru allir bjargaðir. Seinni fór Kál at sigla við Stellunum hjá Laksáfoss brøðrunum. Eftir at hekkutrolararnir í 1972 vórðu seldir til Íslands, var hann eitt skifti við Borgini, sum Andreas Marknagil førdi.

Eftir at Kál legðist uppi, arbeiddi hann nógv hjá Kanjon. Tá var tað, at hann fór at laga. Saman við Boy og øðrum hevur Kál verið við til at laga eitt nú kirkjugarðin, á økinum kring sjúkrahúsið og eisini t. d. á økinum kring Føroya Banka í Klaksvík.

80 ára førðingardagin er Kál, sum avgjørt hoyrir til tey stillu og trúføstu í landinum, burturstaddur.

## Hálvdan Mohr 70 ár

Mikudagin 2. juli fyllir Hálvdan Mohr í Fuglafirði 70 ár. Hann er fuglfirðingur, sonur Súsannu Malenu, f. Jacobsen, av Viðareiði og Mourits Mohr úr Fuglafirði.

Hálvdan tók læraraprógv í Havn í 1956 og var lærari í Fuglafirði til 1963. Aðruhvørja viku var hann á Hellunum skúlaárið 1969-60. Síðani var hann lærari í Herning í 1964-65, vendi so heimaftur og var lærari í Fuglafirði, til hann fór frá í 1997.

Hann var á skeiði í enskum og landalæru á Danmarks Lærerhøjskole í 1960-61 og í enskum og týskum í 1967-68. Hálvdan var bygdaráðslimur í Fuglafirði 1970-76.



### 60 ár

Í dag verður Johnhard Glerfoss 60 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin. Dagurin verður hildin leygardagin 26. juli kl. 19.30 á Føroya Studentaskúla og tá eru øll væl komin. Sigið frá í seinasta lagi 15. juli á tlf. 315156, 215156 ella 281256.

## Dagurin

**2. juli. Syftunsøka.** Hildin til minnis um enska biskupin í Winchester Swithun, sum doyði í 862. 15. juli í 971 varð hann skírdur halgimenni. Dómkirkjan í Stavanger í Noregi er vígd honum. Minningardagur hansara er í Onglandi 15. juli, men í Føroyum og Noregi 2. juli, sum var deyðadagur hansara. Tað er tí helst úr Noregi, at syftunsøkudagur er komin higar. Á fuglaplássum var fleygatíðin frá syftunsøku út í miðjan august. Sum veðrið er syftunsøkudag, skuldi tað standa við til ólavsøku. Eisini varð sagt, at var syftunsøkudagur góður, fór at vera góður hoyterri. 2. juli er eisini ein gomul **mariumessa**, vitjanardagur Mariu, til minnis um at Maria Moy vitjaði skyldkonu sína Elisabet, móðir Doyparans. Tað er eftir hesa vitjan, at Maria syngur lovsong sín, ið fær navnið Magnificat (Hátt setir sál mín Harran etc.) Luk. 1, 39-56.
*Niels Winther varð føddur hendan dagin í 1822.*

## PW í Norðragøtu limur í Samkeyp

TÍÐINDASKRIV

Fyri fýra árum síðan lat Hallur Poulsen í Norðragøtu handil upp eystan fyri fótbóltsvøllin í Norðragøtu. Í mai í ár keypti Petur Eirik Djurhuus helvtina av hesum handli. Hin eigarin er Hallur Poulsen. Petur Eirik eigur annars eisini PE í Havn, ið hevur eina deild í Stoffalág og eina á Argjum. PW í Norðragøtu fór fyri stuttum somu leið sum hinir handlarnir hjá Petur Eiriki og gjørdist partur av Samkeypi. Tá ið avgerðin um at fara upp í Samkeyp varð tikin, var tað serliga marknaðarføringin, ið var orsøkin. Í Norðragøtu eru vit nú við í øllum teimum góðu tilboðunum, sum Samkeyp hevur á skránni, og eg veit av royndum, at tey eru góð, staðfestir Petur Eirik, ið alt fyri eitt upplivdi at fleiri kundar komu á gátt, tá ið farið var upp í Samkeyp. Bókstavirnir, PW, stava frá at langabbi Petur Eirik, Hans Petur Weihe, fekk sær handil í Søldarfirði í 1897 og er tað hetta handilsnavnið ið Petur Eirik og Hallur endurnýta. Gamli PW handilin lat aftur í 1994. Komandi mánaðirnar fara broytingar at henda í PW. Handilin fær størri frysti- og kølidiskar, og eisini fruktdeildin skal gerast størri.

## Helga Hjörvar 60 ár



Helga Hjörvar er fødd í Önundarfirði dygst við Flateyri í Íslandi hin 2. juli 1943, men vaks upp í Reykjavík. Sum blaðung genta fór hon til Keypmannahavnar og arbeiddi sum skrivstovukvinna hjá Mejeriernes og Landbrugets Ulykkeforsikring, MLU. Í sekstiárunum fekk Helga áhuga fyri sjónleiki og arbeiddi frá 1964 m.a. á íslendska Sjónleikaraskúlanum. Í sjeytiárunum leitaði hon aftur til Keypmannahavnar og fór at lesa sjónleik á Lærda Háskúlanum har. Eftir at hava verið í sambandi við Solvognen, Rimfakse og Odinteatret, tók hon saman við øðrum stig til at stovna íslendska sjónleikarabólkin "Androkles" í Keypmannahavn.

Síðani 1. februar 1999 hevur Helga Hjörvar verið stjóri í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Hon er sætti stjórin, nú Húsið fór um tey tjúgu. Meðan Helga hevur verið stjóri, er sjøtil settur á fýra stór tiltøk, sum øll hava ríkað føroyska mentan og ikki minst mentanarliga samstarvið við Norðanlond og grannalondini fyri sunnan og vestan. Talan er um Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, Orfeus, Konsertfelag Norðurlandahúsins, ferðandi framsýningina "Veiðimentan í Útnorðri", sum nú er í Nuuk, og árliga listastevnuna Listastevna Føroya, m.a. við írsku Tjóðar-operuni og "Madama Butterfly" á skránni í 2001 og "Le Cirque Invisble" í ár.

Helga Hjörvar hevur drúgvar royndir innan norðurlendsk sjónleikarasamstarv. Tíggjuáraskeiðið 1982-92 var hon leiðari á Sjónleikaraskúlanum í Íslandi. Eftir hetta stjórnaði hon í 6 ár Nordscen, sum áður nevndist Teater og Dans i Norden. Hetta er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum við heimstaði í Keypmannahavn arbeiðir við sjónleiki og dansi í øllum Norðanlondum.

Helga er útbúgvin sjónleikari og hevur innan hetta øki veitt frálæru, stjórnað og leikt, bæði á palli og í filmi, í Íslandi eins og í Danmark. Eitt nú spældi hin einsamøll í filminum "En børnefilm", sum Hans-Henrik Jørgensen gjørdi í 1971. Mesta virksemi, seinasta tríati ára skeiðið, hevur Helga tó lagt eftir seg innan mentanar- og listarliga umsiting og leiðslu. Fyri hetta virksemið fekk hon íslendska Falkaheiðursmerkið í 2000.

Helga Hjörvar giftist 21. august 1964 rithøvundanum Úlvi Hjörvar (f.1935) og tey hava tvey børn, Helgi (f.1967), sum er nývaldur altingslimur í Íslandi, og Rósa María (f.1980), sum lesur bókmentafrøði á lærda háskúlanum í Odense.

Helga Hjörvar, sum býr í Heygskróki 18 í Havn, heldur føðingardagin í Önundarfirði.

Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á seksti ára degnum. Samstundis, sum vit takka fyri høvi at hava verið við í mentunarliga verksemi tínum, síðani tú komst higar til lands, ynskja vit tær og tínum ein góðan dag og blíðan byr framyvir

**Starvsfólkini í Norðurlandahúsinum í Føroyum**